# Ása Jacobsen 80 ár

Fríggjadagin 4. mai verður Ása Jacobsen í Norðragøtu 80 ár. Ása er ættað úr Fuglafirði. Mamma hennara var Anna Katrina, f. Haraldsen, ættað úr Elduvík. Hon var systir Jacob Haraldsen, sum var ein kendur keypmaður og reiðari í síni tíð í Fuglafirði. Pápin var Hendrik Olsen, sum var ættaður úr Tøðuni við Gøtugjógv. Hann er mest kendur í samband við Fame. Hann var skipari og eigari, og hann rak skipið í samstarvi við svágin Jacob.

Systkini hjá Ásu eru Finnur, Ólavur, Anna og Fía, sum doyði fyri nøkrum árum síðani.

Sum ung kom Ása at hava eina vanliga lívsleið hjá gentum tá í tíðini. Fyrsta arbeiðið var at fara í húspláss hjá mammubeiggjanum Christian Haraldsen í Havn. Aftaná fór hon at arbeiða á skrivstovu hjá Landsbyggifelagnum í Havn. Sum aðrar gentur vildi hon eisini fara út um landoddarnar. Hon fór saman við systkinabarninum Astu, seinni gift við Dánjal Magnussen, niður at ganga á vevskúla. Hetta var eisini nakað fyri Ásu, tí handalagið er gott. Tær búðu tá hjá Edvard, sum var mammubeiggi Ásu og pápabeiggi Astu.



*Ása saman við langommudótrini Jóhonnu*

Mitt í 50-árinum hittir Ása Frans Jacobsen úr Norðragøtu. Tað var so romantiskt, at Ása var saman við systir síni farin til Gøtu á kyndilsmessu at hyggja eftir einum sjónleiki, har Frans spældi við. Tað rennir saman teirra millum, og tey giftast í 1957. Frans er sonur Onnu Louisu og Jóhan Dávid úti á Fløtum, sum tað kallaðist. Frans var tey fyrstu árini sjómaður og fiskimaður. Síðan var hann nógv ár sjómansskúlalærari í Havn, og seinastu arbeiðsárini var hann stjóri á sjómansskúlanum í Klaksvík. Tá fluttu tey bæði aftur í hugnaliga barnaheimið hjá Frans í Norðragøtu, og har býr Ása enn. Frans doyði fyri nøkrum árum síðan. Sum ofta er við hjúnum vóru tey mótsetningar, og sigast kann, at Ása var tann meira jarðbundna av teimum báðum. Men væl riggaði.

Meðan tey búðu í Havn, arbeiddi Ása í mong ár á hvíldarheiminum Naina.

Okkara vegir hava krossast eitt sindur. Vit búðu í sama húsi eitt skifti, eitt sindur er av skyldskapi, so verður farið til Gøtu, er tað fast at fara inn á gólvið hjá Ásu, har eg havi fingið nógvar góðar drekkamunnar. Hon er eitt sera positivt og gevandi menniskja, sum hevur stóra umsorgan fyri sínum. Tað er eisini eitt merkisvert gott samanhald í familjuni, og soleiðis eri eg komin at kenna øll systkini og kenni tey øll sum skilafólk. Hetta er eisini galdandi fyri Ásu. Hon veit nógv og fylgir væl við í tí, sum gongur fyri seg. Frans var við í Gøtu Fornminnisfelag og Blásastovu, og har hevur Ása eisini verið virkin. Eisini er Ása sera fitt í hondunum og er sera kreativ.

Tey bæði fingu tvey børn: Hendrik er giftur við Tony, og tey búgva í Gøtu. Anna Louisa er gift við Fróða, og tey búgva í Havn. Hendrik eigur tríggjar synir og Anna Louisa eigur fýra døtur, og hava ommubørnini ríkað lívið hjá Ásu, og tey vitja eisini javnan ommuna. Eisini er Ása blivin langomma. Lítla Jóhanna er sjálvsagt eisini eygnasteinur hjá langommuni.

Ása er burturstødd føðingardagin.

Góða Ása. Hjartaliga tillukku við tí stóra degnum, sum tú ber so sera væl.

**ó.**

## Andlát og jarðarferðir

**Vilhelm Gustav Hentze av Sandi**, vanliga nevndur Gustav, andaðist á Landssjúkrahúsinum týsdagin 1. mai, 74 ára gamal. Kistan fer suður við Teistanum hósdagin klokkan 15.45. Jarðarferðin verður úr Sands kirkju leygardagin klokkan 13. Sungið verður úr Sálmabókini. Tey, ið vilja minnast Gustav, kunnu lata Sands kirkju eina peningagávu.

**Páll Annfinn Næs**, ættaður úr Leirvík, búsitandi í Herning, andaðist 1. mai, 52 ára gamal.

**Ása Jakobsen**, ættað úr Fámjin, búsitandi í Tórshavn, fer til gravar úr Havnar Kirkju hósdagin 3. maj klokkan 13. Tey, ið vilja minnast Ásu, kunnu lata eina gávu til »Berðin« (børn í sorg) konta í Føroya Banka.

**Sigrun Højsted**, ættað úr Funningi, búsitandi í Svøríki, andaðist í Eksjø sunnudagin 29. apríl, 67 ára gomul.

Lesið Sosialin -so eru tit við!

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara kæri maður, pápi, abbi og verfaðir

**Sverri Jacobsen**
Húsavík

andaðist á Landssjúkrahúsinum 2. mai, 76 ára gamal.

Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

*Familjunnar vegna*
**Elsebeth Helena,**
**Heri og Fríðbjørg v/familju**

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum at kæri maður, pápi, verpápi og abbi okkara

**Gustav Hentze**
av Sandi

andaðist á Landssjúkrahúsinum týsdagin 1. mai, 74 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Sands kirkju leygardagin kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Klara**

# Tøkk



Til tykkum øll, sum komu á gátt, bæði úr Noreg, Danmark og ymsa staðni frá, at gleðast saman við okkum til eina hugnaliga samveru. So kom dupultkvartettin í Ebenezer og ríkaði kvøldið við sínum vøkru sangum - tað fløvaði! Takk fyri.

**Hildubjørg Gulklett**

# Tøkk



Hjartaliga takki eg øllum, sum við gávum, blómum, fjarritum, telduposti og telefon gleddu meg á føðingardegi mínum. Eisini ein stór tøkk til tykkum, ið komu niður at gera mær dagin ógloymandi. Bestu heilsur til tykkum øll.

**Lydia Pedersen, Ishøj**